# Bilar

Nr. 133 • hósdagur • 17. juli 2003 • 77. árg.



*Frá 10. til 31. juli verða hesir Fólkavognarnir, sum teir allar seinastu, gjørdir í Mexico. Tað er stórur eftirspurningur eftir hesum bilum, serliga í USA*

# Fólkavognurin fer í søguna

**Framleiðslan av VW Type 1, Bobluni, byrjaði í Wolfsburg í Týsklandi eftir seinna heimsgardaga. Í ár eru liðin 65 ár síðan grundarsetinurin til Fólkavognsverksmiðjuna varð lagdur og 17. juli eru liðin 50 ár síðan fyrsta Boblan kom til Føroya**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Nú er møguleikin at ogna sær ein spildurnýggjan Fólkavogn í tí allar seinastu útgávuni, ið kallast Ultima Edicion, við kromaðum kúfangarum, pyntilistum, speglum og við hvítum dekksíðum*

Tá starvsfólkið á mexikansku bilverksmiðjuni, Volkswagen de Mexico, í Puebla, fara í summarfrí tann 30. juli 2003, fer seinasta VW Boblan av samlibandinum, eftir at bilurin hevur verið framleiddur í næstan 60 ár. VW Type 1, Boblan, er ein av heimsins mest seldu bilum. Hóast grundarsteinurin til Fólkavognsverksmiðjuna varð lagdur 26. mai 1938, byrjaði framleiðslan ikki fyrr enn eftir seinna heimsbardaga.

Hugskotið um Fólkavognin kom fyrstu ferð fram í 1920, tá ein greivi legði eitt uppskot fram fyri Ferdinand Porsche um ein bil til leikmannin, ið ikki hevði so nógvar pengar at ráða yvir. Í 1931 kom Porsche við eini ætlan, ið nevndist "projekt 12" ið má metast sum tann fyrsta ætlanin, ið skuldi føra til VW Type 1. Grundarsteinurin til Fólkavognsverksmiðjuna varð lagdur tann 26. mai 1938 við gamla Wolfsburg slottið nærhendis lítla býnum Fallersleben í Týsklandi. Tá heimsbardagin brast á, var verksmiðjan ikki liðug. Tá so framleiðslan endiliga kom í gongd, vóru tað hernaðarbilarnir VW Kübelwagen, ið vóru framleiddir har. Tá kríggið var av, lógu 60 prosent av verksmiðjuni í sori eftir øll loftálopini.

Eftir seinna heimsbardaga byrjaði framleiðslan av VW Bobluni. Bilurin bleiv framleiddur fram til miðskeiðis í 70-unum, tá Boblan bleiv avloyst av VW Golf, og øll framleiðslan bleiv flutt til Mexico, har teir eisini høvdu verið gjørdir síðan 1955. Síðan hava teir verið gjørdir í Mexico. Bilurin hevur verið sera væl umtóktur í Latínamerika og aðrastaðni, har vegirnir ikki altíð eru so góðir. Motorurin er aftan, og bilurin trekkjur við bakhjólunum, hetta ger at hann klárar seg væl í hesum londum.



*Fyrsta Fólkavognsboblan í Føroyum. Bilurin bleiv seldur til Hjalmar Jacobsen, el-verkstjóra norðuri á Strond í Klaksvík. Hetta var 17. juli 1953. Á myndini, ið er tikin í 1954, síggjast døtur hansara, Ingun Joensen og Elin Súsanna Jacobsen*

*Myndaeigari: Randi Jacobsen*

### Ultima Edicion

Í sambandi við at framleiðslan nú steðgar, verða 3000 serligir bilar gjørdir frá 10. til 31. juli 2003. Hendan útgávan kallast "Ultima Edicion". Bilarnir verða einans gjørdir í tveimum litum, bláum og beige, teir eru útgjørdir við kromaðum pyntilistum, kúfangarum, hjólskálum og speglum, hvítum dekksíðum og felgum í sama liti sum bilurin. Fyrsti VW bilur í Føroyum, ein 8 persóna bussur, bleiv seldur til Carl A. Jensen keypmann og bilførara í Kollafirði og fyrsta Boblan bleiv seld til Hjalmar Jacobsen, el-verkstjóra norðuri á Strond í Klaksvík 17. juli 1953. Tað var Farodane í Havn, sum seldi hesar bilarnar.

## Audi og Real Madrid



Audi bilverksmiðjan og spanska fótbóltsfelagið Real Madrid, sum síðsta kappingarár vann spanska meistaraheitið, hava gjørt eina 3 ára sponsoravtalu. Avtalan bleiv undirskrivað av stýrisformanninum í Audi AG, Dr.Martin Winterkorn, og Real Madrid forsetanum Florentino Pérez

*Kelda: www.selmer.dk*

## Bilasølan minkar




Við 8.431 seldum bilum í juni 2003, kunnu De Danske Bilimportører staðfesta eina minking uppá 24,8 prosent á mun til sama mánað í fjør. Samlaða bilasølan fyrra hálvár í ár var 20 prosent minni enn í fjør

*Kelda. www.bilpriser.dk*

## Mazda6 við DSC



Í Danmark eru Mazda6 við Dynamic Stability Control (DSC) nú 6.400 krónur bíligari. Orsøkin er avleiðingin av eini nýggjari lóg, sum minkar tollin á hesi týdningarmiklu trygdarútgerð

*Kelda: Mazda Motor Danmark*



# Ford Streetka – smartur sportsbilur til tvey

*Lennard Pedersen, sølumaður hjá P/F Wenzel, við nýggja Ford Streetka*







*Bakkilyktin er í miðjuni undir nummarplátuni*

**Á bilasøluni hjá P/F Wenzel hava teir fingið ein Ford Streetka. Bilurin bleiv av fyrstan tíð sýndur fram sum prototypa í 2000, og í vár kom hann á marknaðin sum opin bilur við kalesju**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*Myndir: Jens Kristian Vang*




*Streetka við galesju*

Tað eru nøkur ár síðan Ford Ka kom á marknaðin. Ein bilur við annarleiðis designi sum tey flestu høvdu eina meining um. Nú er so Ka komin í sportligu útgávuni Streetka til tveir persónar. Streetka er ein opin bilur við stoff-kalesju og styrtboylum aftanfyri bæði setrini. Bilurin er á leið somu stødd sum tann vanligi Ford Ka. Stóra aksilfrástøðan og sporvíddin saman við 16" dekkunum gera, at bilurin hevur góðar koyrieginleikar og liggur væl á vegnum, hann hevur sera gott vegtak og stýrir fast og neyvt í svingum. Motorurin er ein 1,6 litur 4 syl. við 95 hk, sum hóskar væl til bilin. Viðførisrúmið á bilum í hesi støddini er sjáldan stórt, men á Streetka er tað heilar 214 litrar.

Persónbilar eru vanliga ein samlað konstruktión, har takið á bilinum er við í berandi konstruktiónini. Tá so bilurin, sum í hesum førið, ikki hevur tak, men leysa kalesju, krevur tað at hann er heilt annarleiðis uppbygdur, soleiðis at karossaríið er stútt, hóast onki tak er at halda konstruktiónini saman. Tað ein grund til at bilar uttan tak ofta eru dýrari enn vanligir persónbilar. Av trygdarútgerð kunnu vit nevna t.d. airbag til bilføraran og síðumannin og síðuairbag, styrtboylar, stálbjálkar í hurðunum, trygdarkabinu við stálbjálkum. Hesin bilurin hevur t.d. tokulyktir framman, el-síðuspegl við hita, sportsetur, leður-ratt, 16" alufelgur og PATS-startsperru.

Ford Streetka er ein smartur lítil sportbilur, sum kappast við bilar sum Mazda MX-5, Smart Roadster og Peugeot 206 CC.



*Ford Streetka innan. Styrtboylar eru aftan fyri setrini*

## Ford Streetka 1,6

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,6 litur 4 syl. 8V bensin 95 hk |
| 0-100 km/t: | 12,1 sek |
| Bensinnýtsla: | 12,7 km/l |
| Dekkstødd: | 195/45-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 365,0 cm |
| Breidd: | 170,0 cm |
| Hædd: | 134,0 cm |
| Eginvekt: | 1025 kg |
| Viðførisrúm: | 214 litrar |
| Prísur: | kr. 270.000,- |
| Søluumboð | P/F Wenzel<br>Akranesgøta<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 354500<br>www.wenzel.fo |